tíðindablaðið
sosialurin
Internet: www.sosialurin.fo

Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov

Marknaðardeild: Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
Blaðfólk: Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dánjal Højgaard

Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Høgni Mohr
Ítróttur: Jákup Mørk

Myndamenn: Jens Kristian Vang, Ólvur Haraldsen
Útgevari, uppseting: Sp/f Sosialurin
Bústaður: Argjavegur 26, Argir

Postadr: Postsmoga 76, 110 Tórshavn
Telefon: 311820
Telefax. 314720
e-mail: post@sosialurin.fo
Lýsingar: lysing@sosialurin.fo
Prent: Sosialurin

Samvinna við næstu grannar okkara

Oddagrein

HESAR seinastu dagarnar hevur verið áhugaverd vitjan úr næstu grannalondum okkara, øðrumegin Íslandi og Grønlandi og hinumegin úr Stórabretlandi. Stóra sølustevnan Tórekk varð hildin í Havn í vikuskiftinum við luttøku av nógvum íslendskum og grønlendskum virkjum umframt kendum núverandi og fyrrverandi politikarum. Henda sølustevnan er annaðhvørt ár í Reykjavík og í Havn. Í sambandi við sølustevnuni var íslendski ídnaðarmálaráðharrin á vitjan og metti hon Føroyar sum ein náttúrliga leingjan av íslendska heimamarknaðinum. Føroyski ráðharrin á økinum beyð m.a. íslendingum at gera íløgur í Føroyum. Eisini fyrrv. íslendski forsetin, Vígdis Finnbogadóttir var við í stóra tiltakinum. Hennara leiklutur var eisini at greiða frá tí stóra og spennandi tiltakinum „Nordatlantens Brygge“, sum er í gerð í Keypmannahavn í løtuni. Hetta er eitt tiltak, sum vit fara at hoyra meira til í komandi tíðum. Eitt tiltak, sum nettup skal vera við til at menna sam-vinnuna og knýta tættari bond millum londini í Norðuratlantshavi og at skapa áhuga og virðing fyri hesum londum úti í heimi. Neyvan finst nakar betri ambassadørur fyri hesi ætlan enn fyrrverandi íslendski forsetin. Vit ynskja henni øðrum, sum eru við til at gera hesa ætlan til veruleika góða eydnu.

HIN vitjanin í hesum døgum er úr Stórabretlandi. Ella kanska rættari Keypmannahavn. Tað er nýggi bretski sendiharrin í Danmark, sum vitjar Føroyar fyri fyrstu ferð. Hann skal vera vælkomin. Í samrøðu við Sosialin (hon kemur í blaðið í vikuni, blaðstj.) sigur hann seg síggja stórar møguleikar fyri øktum samstarvi millum Føroyar og Stórabretland. Her hugsar hann ikki minst um komandi oljuútviklingin á Atlantsmótinum, og tað er so heldur ikki av tilvild, at eitt so høgt umboð fyri bretskar myndugleikar, vitjar í Føroyum stutt eftir, at størsta fyritøkan í Bretlandi, BP Amoco, hevur latið upp skrivstovu her.

NETTUPP umrøddu vitjanir úr næstu grannalondum okkara eru dømi um, hvat er við at henda í hesum partinum av heiminum. Størri og størri áhugi er fyri Føroyum, ikki minst tí, at vit liggja so væl fyri við einum sera ríkum havøki, og møguliga eisini eini ríkari undirgrund. Tað er so heldur ikki av tilvild, at flestu føroyingar ynskja broytt viðurskifti eitt nú í framtíðar sambandinum við Danmark. Tað eru tey, sum vilja hava fullveldi, og tað eru tey, sum vilja hava størri sjálvstýri. Í báðum førum er grundarlagið ein meira støðugur og fjøltáttaður búskapur. Og har er samvinnan við næstu grannar okkara eisini ein týðandi partur. Tí heilsa vit bæði Tórekkfólkunum, Vígdis Finnbogadóttir og bretsku sendiharrahjúnum vælkomnum til Føroya. Latið okkum í felag hjúkla um og verja tey mongu virði, sum hesin parturin av Atlantshavi hevur fostrað. Saman kunnu vit menna ikki bert okkum sjálvi, men alt økið sum eina heild. Og tað er eisini nettup hesa slóð vit eiga at fylkjast um, slóðina móti einum handilsligum, vinnuligum og mentanarligum øki í Norðuratlantshavi - við luttøku av oyggjarlondum og tess næstu grannum, eitt nú Stórabretlandi.

Sosialurin

Viðmerking:

Heiðin tala

”At tosa við Sambandsflokkin um at minka blokkin, er beinleiðis heiðin tala”. Nakað soleiðis var ein av viðmerkingunum hjá Jógvani Mørkøre til seinastu veljarakanning.

Hvussu ber tað til, at tú Jógvan Mørkøre, sum samfelagsfrøðingur, og sum óheftur eygleiðari og kennari á landsins hægsta lærustovni, alment kanst geva eina so skeiva og villleiðandi lýsing av Sambandsflokkinum?

Í fyrstani kundi eg ikki fata tíni ord ørvísi enn, at tey vóru ein politisk royndt at seta kílar ímillum Sambandsflokkin og Javnaðarflokkin. Men eg kann ikki fáa meg til at trúgva, at okkara hægsta undirvísingarskipan er so partapolitiskt virkin, og tískil standa tíni ord enn sum ein stór gáta fyri flest allar føroyingar.

Sambandsflokkurin eigur ikki blokkin

Umrøddi blokkur er ein avleiðing av framdum yvirtøkum uttan gjaldsskyldu. Allir flokkar, uttan Sambandsflokkurin hava framt hesar yvirtøkur, og tískil standa allir flokkar, uttan júst Sambandsflokkurin fadrar at verandi blokki.

Góði Jógvan! Hví vilt tú nú so fegin hava Sambandsflokkin til at ættleiða hetta óskikkiliga barnið, sum verður kallað blokkurin? Vilja fadrarnir ikki longur kennast við sítt egna avkom?

Óskikkiligt ella ikki — barnið er komið, og tess fadrar hava hjúklað so nógv um sítt óynskta barn, at tað bara er vaksið ár um ár. Hví ikki greiða Føroya fólki frá hesum stóra paradoksi, sum valdar innan loysingarrørsluna?

Hetta vil Sambandsflokkurin

Men hvat ætlar Sambandsflokkurin at gera við tann nógv umrødda blokkin, sum ørkimlar allar loysingarflokkar, og nú eisini skilamannin Jógvan Mørkøre ?

Í nýskipananuppskoti Sambandsfloksins verða Føroyar roknaðar sum partur av einum ríki, ið er samansett at trimum javntstilldum londum.

Fyri at kunna vera í einum ríkisfelagsskapi, er neyðugt at nøkur málsøki eru felags fyri alt ríkið. Hesi eru:

1. Kongshúsið
2. Grundlógin
3. Gjaldoyrað
4. Uttanríkismál
5. Verjumál
6. Rættarskipanin

Øll onnur málsøki skulu vit hava møguleika til at yvirtaka. Tað skal tó ikki bera til at yvirtaka nakað málsøki, uttan so, at gjaldskylda eisini fylgir við yvirtøkuni. Tann sum skal valda, skal eisini gjalda.

Hvar í hesum greiða boðskapi frá Sambandsflokkinum, sum er borin í hvørt hús í Føroyum, finnur Jógvan Mørkøre nakra forðing fyri at minka um um verandi blokkstuðul ?

Sjálvbjargin í ríkisfelagsskapi

Vit mæla ikki til nakra yvirtøku, fyri at fáa fullveldi (loysing). Nei vit mæla ístaðin til yvirtøkur, sum kunnu gera Føroyar alt meira sjálvbjargnar.

Nær og hvussu langt tíðarskeið ein yvirtøka skal fevna um, avgera vit sjálvi. Vit skulu sjálvi áseta skiftistíðina fyri hvørja yvirtøku sær.

Vit ætla ikki at leypa á bláman, eins og Tjóðveldisflokkurin ætlar. Vit vilja heldur mæla til, at ein nýggj skipan landana millum verður tilevnað í tøttum samstarvi millum føroyskar og danskar myndugleikar, so vælferðin og frælsið hjá tí einstaka føroyinginum,

bæði her heima og uttanlands, ikki verður sett í vanda.

Hava mælt til at minka blokkin

Eilif Samuelsen, fyrrverandi landsstýrismaður og undirritaði hava alment tríggjar ferðir mælt samgonguni til at koma í gongd beinan vegin við at minka blokkin. Vit hava víst á møguleikan at yvirtaka til dømis skúlaverkið, men tíverri hevur hetta verið til onga nyttu. Samgongan — ella rættari Tjóðveldisflokkurin — vil bert tosa um fulla loysing.

Tórshavn tann 19.04.2000
Trygvi F. Guttesen

Sosialurin letur tíðindi til Olivant

Sosialurin hevur nú tikið yvir tíðindatænastuna á heimasíðuna hjá Føroya Tele, har stutt tíðindi í telegramformi regluliga verða løgd út

EIRIKUR LINDENSKOV

Í gjár fóru Sosialurin og Føroya Tele undir samstarv um tíðindatænastu.

Í eini royndartíð hevur tað verið Føroyska Tíðindastovan í Keypmannahavn, sum hevur lagt tíðindi út á heimasíðuna hjá Føroya Tele, www.olivant.fo.

Frá í gjár at rokna er tað Sosialurin, sum stendur fyri hesi tíðindatænastu.

Talan verður um stutt tíðindi í telegramformi, sum verða løgd út á heimasíðuna við jøvnum millumbilum. Talan verður ikki um longri greinar. Ynskja fólk at lesa meira um eitthvørt evni á internetinum ber til at lesa tað í InternetSosialinum, har alt tilfarið, sum er í prentaða blaðnum, eisini er at síggja.

Í fyrstu atløgu verður serliga talan um føroysk tíðindi, men seinni verður hetta víðkað til onnur øki við.

Liðugt við píkum

Nú er ikki longur loyvt at hava píkadekk undir bilunum.

1. mai er altjóða arbeiðaradagur, men tað er eisini dagurin, tá tað er liðugt við at brúka píkar.

Tað hevur verið kalt í veðrinum langt inn í apríl mánaða, men um mánaðarskiftið kom rættiliga vend í veðurlagið, so vit hava havt góðveður seinastu dagarnar.

Og tað var í tøkum tíma, tá hugsað verður summardekkini.

Verkstøðini, sum skifta dekk á bilum, hava havt úr at gera eftir vikuskiftið, og væntast kann, at løgreglan fer at gera onkrar kanningar komandi dagar.

Danski forsætisráðharrin eigur at virða føroyska útspælið og seta seg niður at samráðast við føroyingar við opnum sinni, heldur Høgni Hoydal, landsstýrismaður

Nú skal vera liðugt við uttanumtosinum

Løgmaður og Høgni Hoydal eru á einum máli um, at nú skal greiða fáast á, um danir vilja samstarva við Føroyar í nýggjari ríkisrættarligari støðu

JOHN JOHANNESSEN
UR KEYPMANNAHAVN
KL: 11:30

Landsstýrið fer á samráðingarfundinum við donsku stjórnina í dag at krevja at fáa greiðu á, í hvønn mun danir ynskja at samstarva við føroyingar, fáa Føroyar fullveldi. Løgmaður sigur seg vilja hava greið boð um, hvørji rættindi føroyingar kunnu fáa í Danmark, um vit kunnu varðveita kongshúsið og um føroyingar kunnu hava felags valuta við Danmark.

Afturat hesum krevur landsstýrið at fáa greið boð um, hvat útmeldingin hjá danska forsætisráðharranum um, at búskaparliga skiftistíðin ikki verður longur enn trý til fýra ár í veruleikanum merkir.

– Tað nyttar ikki, at danski forsætisráðharrin bara tosar um eina skiftistíð á trý til fýra ár, uttan at koma nærmari inn á, hvat ein slík skiftistíð inniheldur. Støðan kann jú sammetast við, at vit fáa at vita hjá bakaranum, at eitt breyð kostar tíggju minuttir í staðin fyri, at vit fáa prísin at vita í pengum, sigur Høgni Hoydal.

Løgmaður ger í sama sambandi greitt, at landsstýrið framvegis fer at krevja at fáa eina skiftistíð á 15 ár. Kortini sigur løgmaður seg vera til reiðar at tingast um ymsar møguleikar fyri einari búskaparligari skiftistíð, og vísir hann á, at landsstýrið hevur fleiri modell liggjandi klár.

Skulu kenna okkum trygg

Anfinn Kalsberg sigur, at hóast landsstýrið er sinnað at tingast við danir um skiftistíðina, skulu føroyingar kenna seg púra vissar um, at landsstýrið ikki fer at seta vælferðina hjá tí einstaka føroyinginum í vanda.

– Landsstýrið fer ikki at leypa á bláman, tað skulu føroyingar kenna seg púra vísan í, ger løgmaður greitt.

Løgmaður sigur, at hann ikki ælar sær at taka undir við nakrari skipan, ið føroyingar ikki fara taka undir við. Fyri hann er tað ógvuliga týdningarmikið, at avtalan, ið fæst í lag, er ein avtala, sum kann fáa breiðan meiriluta í Føroyum.

Høgni Hoydal er samdur við løgmanni, og sigur hann, at hann heldur tað nú vera upp á tíðina at sleppa revolvarapolitikkinum og fara undir veruligu samráðingarnar. Í hesum orðum liggur heilt greitt ein áheitan á danska forsætisráðharran. Landsstýrið vil hava at vita, um stjórin er sinnað at samráðast um ein frælsan felagsskap ella ikki.

Oljan møguliga við

Greiðar ábendingar hava seinastu tíðina verið um, at landsstýrið fer at brúka møguligar føroyskar oljuinntøkur sum ein trumf í samráðingunum um búskaparligu skiftistíðina. Hugsandi er, at møguligar oljuinntøkur skulu mótroknast ríkisveitingini úr Danmark.

Hesi tíðindi vil Høgni Hoydal ikki vátta, men hann sigur kortini, at tað kann henda, at oljan verður drigin upp í leikin, tá skiftistíðin verður viðgjørd. Men sambært Høgna Hoydal fer landsstýrið ikki at selja út av ognum føroyinga fyri at fáa fullveldi.

Væl fyrireikað

Føroyska samráðingarnevndin er væl fyrireikað undan samráðingunum. Meginpartin av degnum í gjár sótu landsstýrisfólkini saman við embætisfólkunum á Føroysku Viðskiftastovuni, har tey gjøgnumgingu alt samráðingaruppleggið punkt fyri punkt.

Høgni Hoydal vísir eisini á, at landsstýrið hevur fyrireikað seg til samráðingarnar í heili tvey ár, og eru allir møguleikar viðgjørdir í endar og kantar. Tí heldur hann, at danski forsætisráðharrin eigur at virða føroyska útspælið og seta seg niður at samráðast við føroyingar við opnum sinni.

Internet-sosiaurin fylgir samráðingunum

Internet-Sosialurin fylgir samráðingunum á Christiansborg, og tá okkurt nýtt hendir, verður hetta lagt á www.sosialurin.fo - sum øll hava møguleika at lesa til mikukvøldið

Karius og Baktus á sjónbandi

Bókadeild Føroya Lærarafelags hevur í samstarvi við Tvøroyrar Sjónleikarfelag givið út leikin um Karius og Baktus á sjónbandi. Bókadeildin ehvur áður givið út bókina um teir báðar jassarnar, og tí hildu tey í Tvøroyrar Sjónleikarfelag tað var natúrligt at fara í samstarv við Bókadeildina um at geva leikin út á sjónbandi.

Tað eru tær báðar, Birita Johansen og Elin Mortensen, sum síðstu mánaðirnar hava spælt leikin fyri fullsettum leikhúsum í Føroyum. Gitte Jacobsen hevur stjórnað leikinum og Eyðun Ásason hevur gjørt pallmyndirnar. Avbera góða móttøkan, sum leikurin beinanvegin fekk, gav teimum í Tvøroyrar Sjónleikarfelag hugskotið at gera hann til sjónband. Nógv sjónbond eru til børn, tey eru at fáa allastaðni, men tað er við teimum, sum tað var við barnabókum fyri 15-20 árum síðan: Næstan alt er á donskum. Fyri jól kom barnasjónbandið Kular røtur hjá Steintóri Rasmussen og øðrum, men annars er onki at fáa til keyps við føroyskari talu. Orsøkin er fyrst og fremst, at tað er so dýrt at gera sjónbond til okkara avmarkaða marknað.

Sjónbandið um Karius og Baktus er vorðið veruleiki, tí fleiri fyritøkur og Mentunargrunnur Føroya Løgtings játtaðu at stuðla tiltakinum. Fyritøkurnar eru: Tryggingarfelagið Føroyar, Tvøroyrar Kommuna, M.B.M., L.Í.V., Atlantic Airways, Føroya Banki, Norðurlandahúsið og Fóm Ísur. Øllum hesum takka útgevararnir hjartaliga.

10. og 11. februar varð leikurin spældur fleiri ferðir í Norðurlandahúsinum, og tá skipaði Bjarki Thomsen fyri at taka leikin upp.

Spf. Sjónband hevur staðið fyri at gera sjónbondini.

Sjóbandið um Karius og Baktus kostar kr. 120 í handlunum.

Shetland Cruise 2000 summarið www.smyril-line.fo
SMYRIL LINE
Tel 34 59 00
Farið verður av Havnini mánadag og komið verður aftur mikudag

Gisting á hotelli
ur einans ... 864,- fyri hvønn (í lágarstíð)

Gisting á vallaraheimi
ur einans ... 691,- fyri hvønn (í lágarstíð)

Privat gisting
ur einans ... 819,- fyri hvønn (í lágarstíð)

Nógvir handlar hava opið týsdag til kl. 18.30

Á farstøðini í Lerwick er møguleiki fyri at lata inn viðføri til varðveitslu til fráferðina hjá Norrönu

Hvørt týskvøld frá kl. 18.30 - 24.00 verður skipað fyri útferð til m.a. Central Mainland og Scalloway. Vitjað verður á fleiri áhugaverdum støðum har m.a. verður sýnt fram hetlendskt handverk. Eisini er høvi at njóta eina hetlendska máltíð.

Ring og hoyr nærri !

e-mail: booking@smyril-line.fo